# Gammeltoft-Hansen heldur fyrilestur

Fólkatingsins umboðsmaður fer at vitja í Føroyum í næstu viku.

Hóskvøldið fer hann at halda fyrilestur á Fiskirannsóknarstovuini.

Hans Gammeltoft-Hansen, sum er professari í rættarvísund, fer at halda fyrilestur, sum hann kallar *Ombudsmandens funktion og statsretslig placering*.

Gammeltoft-Hansen hevur verið umboðsmaður hjá Fólkatinginum síðani 1987.

Ferðin í Føroyum er fyriskipað av Landsstýrinum, Búskapar- og løgfrøðingafelagnum og Dansk Jurist- og Økonomforbund, sum halda skeið, har Gammeltoft-Hansen er boðin við.

Hann hittir eisini løgtingsnevndina, sum er sett at viðgera ein Løgtingsins umboðsmann, nú hann er í Føroyum.

**ek**

# Tingmaður vorðin formaður fyri LFÚ



Jákup Sverri Kass, tingmaður, er vorðin formaður fyri LFÚ, sum er felagsskapurin hjá føroyskum lesandi.

Hetta var greitt eftir eykaaðalfundin í síðstu viku. Har varð nýggj stjórn vald, og tey, sum nú eru í stjórnini, eru: Jákup Sverri Kass, formaður, Brandur í Funningsstovu, næstformaður, Sigfríður Abrahamsen, kassameistari, Eyðna Jensen, skrivari, Harriet Poulsen, mentanarleiðari, Niklas Winther og Edvard á Hólalagnum.

Endamálið hjá LFÚ er – óheft av partapolitikki og átrúnaði – at virka fyri góðum samstarvi millum allar føroyingar, sum eru í útbúgving.

Limaskap í LFÚ kunnu øll tey lesandi fáa, ið hoyra til eitt næminga- ella lærlingafelag, treytað av at hetta næminga- ella lærlingafelag er limur í LFÚ.

**ek**

# Fotoframsýning í Norðurlandahúsinum

Fotoklubbin »Ljósálfar« er ein lítil klubbi við limum, sum hava áhuga í at fotografera. Klubbin ynskir somuleiðis at útvikla sans og val av motivum, soleiðis at skilja, at tað at fotografera eisini kann roknast upp í list.

Tá ið limirnir í »Ljósálfum« koma saman, tosa teir um ymsar spurningar, sum snúgva seg um at fotografera, hyggja at fotomyndum ella ferðast á fotoferðum, viðhvørt á longri ferð og viðhvørt á styttri.

»Ljósálfar« hava luttikið á framsýningum bæði innan og uttanlands einsamallir ella saman við øðrum. Teir hava havt samstarv við útlendskar fotografar, hjálpt teimum við at leggja ferðir til rættis, virkað sum leiðbeinarar og hjálp upp á ymsar hættir.

### Vilja vísa myndir

»Ljósálfar« halda, at Føroyar eru eitt ógvuliga áhugavert stað fyri fotografar, og hav aoyggjarnar nógv vøkur motiv. Tí fóru 5 Ljósálfar til Føroyar á fotosafari.

Teir ferðaðust ymsastaðni, teir 14 dagarnar teir steðgaðu í Føroyum. Ferðin fekk heitið »Færeyar 99« og varð endamálið, at hvør av teimum 5 tulkaðu sítt sýn upp á oyggjarnar í myndum.

Nú vilja teir fegin vísa, hvat ið kom burtur úr og vilja fegin vísa fotomyndirnar á framsýningum í Føroyum, Íslandi, Álandi og Svøríki.

Nordisk Kulturfond hevur stuðlað tiltakinum.

# Nyrup hevur sett nýggjan stjóra

Ministarasekreteriatið hjá danska forsætismálaráðharranum, Poul Nyrup Rasmussen, fær 1. apríl nýggjan stjóra.

Talan er um 36 ára gamla Bo Jeppesen, ið hevur verið redaktørur á donsku sjónvarpsstøðini TV2-Nord.

Bo Jeppesen er útbúgvin cand. scient. pol. og hevur fyrr verið politiskur tíðindamaður á Berlingske Tidende og á tíðindaredaktiónini hjá TV2. Harafturat hevur hann verið tíðindaskrivari hjá fólkatingsbólkinum hjá Det Radikale Venstre og kunningarráðgevi í danska vinnumálastýrinum.

**jojo**



*Eitt fólk varð flutt á Landssjúkrahúsið, tá bilurin hjá varda verkstaðnum Stíggi fór út av . Mynd: Hallur Hansen*

# Vánalig koyrilíkindi

Koyrilíkindini hava verið stak vánalig kring alt landið seinastu dagarnar.

Fyrradagin førdi hetta til, at hesin bilurin hjá varda verkstaðnum Stíggi í Runavík fór út av smala vegnum til Skála.

Fimm fólk vóru í bilinum, og fekk eitt teirra so mikið stóran skaða, at viðkomandi varð fluttur á Landssjúkrahúsið. Hesin livir væl eftir umstøðunum.

Í ringa kavaverðrinum í gjar hendu fleiri smærri ferðsluóhapp kring tað mesta av landinum, og eisini stóðu fleiri bilar fastir í kavanum omanfyri Kvívík.

Løgreglan í Eysturoynni fráráddi í gjár fólki at koyra, tí líkindini vóru so út av lagi vánalig.

**jojo**

# Skúlaútbyggingin samtykt

*Fuglafjarðar Býráð samtykti týskvøldið at fara undir fyrsta byggistig og at fara undir at projektera annað byggistig av útbyggingini av skúlanum. Henda ætlan er mett at kosta knappar 14. mió. krónur*

SVEINUR TRÓNDARSON

Í blaðnum í gjár skrivaðu vit um ætlanirnar at byggja út skúlan í Fuglafirði.

Henda ætlan var fyri á býráðsfundi týskvøldið og har samtykti býráðið at fara undir fyrsta byggistig av ætlanini. Eisini varð samtykt, at fara undir detailprojekteringina av øðrum byggistigi av útbyggingini.

Ætlanin kemur at kosta knappar 14 mió. krónur, men verður ikki gjørd eftir einum ári. Kommunan er heft at íløguloftinum hjá Fíggjarmálastýrinum og fyri fuglfirðingar er loftið sett til góðar 5 mió. krónur.

### Stór ætlan

Útbyggingarætlanin fyri skúlan er annars ikki so lítil.

Øll ætlanin sum hon er, er mett at kosta góðar 50 mió. krónur, og tað voldi eisin til eitt sindur av orðadrátti á fundinum.

Einki áramál var sett fyri samlaðu útbyggingina og niðurstøðan hjá býráðnum var, at tað var torført at taka støðu til eina ætlan, sum liggur so langt frammi í tíðini. Tí tók býráðið bara støðu til teir báðar fyrstu partarnar, sum eisini koma at tyngja íløguætlanina hjá kommunni fleiri ár framyvir.

### Serstovurnar mangla

Býráðslimirnir vóru allir samdir um, at útbyggingin er neyðug, tí skúlin, sum hann er í dag, er illa fyri hvat serstovum viðvíkur.




*Tað verður hesin parturin sum fyrst verður bygdur aftur at skúlanum í Fuglafirði, og tað eru her serstovurnar eru*

Hetta bøtir fyrsta byggistig upp á og allir býráðslimirnir vóru samdir um at farast skuldi undir hetta byggistigið alt fyri eitt.

Næsta byggistig er at byggja nýggja bygningin og tann gamla saman við eini gongd, sum ikki er møgulig at gera á annan hátt. Svimjihøll og fimleikahøll eru í bygninginum, sum gongur oman ímóti nýggja bygninginum, sum verður bygdur í niðaru síðu og tí verður neyðugt at gera ein bygning, sum bindur hesar báðar partarnar av skúlanum saman.

Restina av verkætlanini vildu limirnir ikki taka støðu til, tí teir meta sum sagt, at hon liggur ov langt frammi í tíðini.






# Riggar tú til fisk ?

...vit søkja eftir 20 ungum kvinnum og monnum, ið skulu mynda føroyska fiskivinnu komandi árini.

**Eitt sindur um teg**
Tú ert púra vitandi um, at Føroyar hava brúk fyri tær. Tað sæst ikki á skræðuni, men tú hevur eitt brennandi ynski um at taka lut í at ávirka framtíðina í Føroyum.

**Eitt sindur um okkum**
Vit bjóða eina spennandi útbúgving, ið tekur støði í veruleikanum. Tað, tú lærir, kanst tú brúka, og tey, ið undirvísa, eru fólk í lyklastørvum í føroysku fiskivinnuni.

**Fiskivinnuskúlin bjóðar tvinnar útbúgvingar**

- 2 ára vinnurættað útbúgving (AIF), ið gevur beinleiðis atgongd til arbeiðsmarknaðin ella tøkniligar útbúgvingar á matvøruøkinum.
- 3 ára yrkisgymnasial útbúgving (HIF). At ein útbúgving er yrkisgymnasial merkir, at hon gevur atgongd til hægri útbúgvingar.

**Ring 424573 og bið um umsóknarblað.**



## Fiskivinnuskúlin í Vestmanna

**Postrúm 96 - 350 Vestmanna - Tlf. 42 45 73/42 44 96 - Fax 42 44 28**
**www. fiskvest.fo - Teldupostur: fiskvest@fiskvest.fo**

stephanssons hús